# Studentaskúlalærarar harta Gerhard

**Fakfelagið hjá HF- og studentaskúlalærarum mótmælir, at ivi verður sáddur um førleikan hjá samkyndum at vera lærarar og pedagogar**

YVIRLÝSING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Studentaskúlalærarar átala serliga, at spurnartekin verður sett við førleika hjá samkyndum at arbeiða í undirvísingar- og uppalingarhøpi*

Nógv hevur verið kjakast í seinastuni um rættindini hjá samkyndum í Føroyum. Ikki minst hava Mogens Tilsted Christensen, prestur í Hvalvík, og Gerhard Lognberg, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, verið hartaðir fyri at hava sagt, at samkynd eftir teirra tykki ikki eiga at fáa starv sum lærarar ella námsfrøðingar.

Í yvirlýsing, sum er skrivað fríggjadagin 27. januar, loysir Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara frá posabandinum:

»Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara harmast um og átalar ta niðrandi viðferð samkynd hava fingið í Føroyum.

Serliga átala vit, at spurnartekn verður sett við teirra førleika at starvast í undirvísingar- og uppalingarhøpi.

Slík framferð er óetisk og hoyrir ikki heima í einum siviliseraðum, demokratiskum samfelag«.

Innlendismálaráðið:

# Ger ikki meira við meirilutan í Tórshavnar Býráð

**Stutt fyri jól kærdi minnilutin í Tórshavnar Býráð meirilutan til kommunala eftirlitið hjá Innlendismálaráðnum fyri at hava keypt Degns Hús fyri fimm milliónir krónur. Í skrivi dagfest hósdagin 26. januar, verður tó staðfest av Innlendismálaráðnum, at klagan verður ikki viðgjørd**

KOMMUNALT EFTIRLIT
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Kommunala Eftirlitið tekur ikki støðu til, um kommunalar avgerðir, ið eru tiknar innan fyri lógarinnar karmar, eru rímiligar ella um tær eru skilagóðar. Tí ger eftirlitið ikki meira við kærurnar frá minnilutanum í Tórshavnar býráð*

Í skrivinum stendur m. a., at »Kommunala eftirlitið er eitt lóggildiseftirlit (legalitetseftirlit), t. v. s. at kommunala eftirlitið skal ansa eftir, at kommunan, í hesum førinum Tórshavnar kommuna, hevur tikið sínar avgerðir sambært galdandi lóg, og at kommunan ikki hevur sett lóggávu ella galdandi rætt til viks.

Kommunala eftirlitið tekur ikki støðu til, um kommunalar avgerðir, ið eru tiknar innan fyri lógarinnar kamramr, eru rímiligar ella um tær eru skilagóðar ella ikki.«

Sostatt ger Innlendismálaráðið ikki meira við málið.

Sjálvur metir Heðin Mortensen, borgarstjóri, ikki at keypið hevur verið við til at hækkað sethúsaprísirnar í høvuðsstaðnum.

– Nei, hetta er nakað heilt serstakt, tí ikki øll eiga hús á Vaglinum, og tað er so ymiskt, hvat hús kunnu brúkast til, sigur Heðin Mortensen.

STANLEY
Dygdar skjótihurðar, við kúluleiðum
- verða gjørdar eftir uppgivnum mátum



á Hjalla - 188 Hoyvík
Tlf 315415 - Fax 319001
damor

Vit hava fingið veingir



ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK

SBW Express bjóðar dygdargóða flogfrakt tænastu til ein kappingarføran prís.



Ring á telefon nr. 345960 ella 545970
ella skriva á teldupost cargo@sbwcargo.com

...Skjótasta flutningstænasta á Norðuratlantshavi !
SMYRIL BLUE WATER